## Gransking á Fiskaaling komandi árini

**Nýggir framleiðslumøguleikar**

Føroyska laksaalivinnan er sterk og væl skipað. Tó eru flestu núverandi aliøki gagnnýtt meira ella minni til fulnar.



Fyri at alivinnan í Føroyum kann vaksa og mennast burðardygt, má meira fáast burtur úr verandi økjum, og nýggj øki mugu eisini finnast.

Fiskaaling fer at granska í nýggjum framleiðslu-møguleikum:

Aling av nýggjum sløgum: Fiskaaling vil menna trygga útgerð til harðbalin øki.

Menning innan staðseting av nýggjum aliøkjum: Fiskaaling vil seta upp mannagongdir til at meta nýggj aliøki.